# Ískoyti til viðmerkingar um »Pensjónsnýskipan 2009«

ARNE THORSTEINSSON
næstformaður, Landsfelag Pensjónista



Í áliti um “Pensjónsnýskipan 2009” eru útrokningar av sonevndum “eldraútreiðslum” seinru árini, og framskrivingar heilt fram til ár 2050 av, hvussu stórur partur av bruttotjóðarúrtøkuni (BTÚ) fer at verða nýttur til hesar somu “eldraútreiðslur”, um ikki verður táttað í.

**Í stuttum eru niðurstøðurnar,**

· at “eldraútreiðslurnar” fara at vaksa úr 10% upp í 20% av BTÚ í 2049,
· at tá verður neyðugt at taka 60% inn í skatti,
· og at henda gongd kann verða tálmað við at taka millióna upphæddir av fólkapensjónini hjá verandi og komandi pensjónistum.

Landsfelag Pensjónista skal ikki her gera viðmerkingar til sjálvar framskrivingarnar, men ráðini at venda gongdini undra okkum almikið, tí sum kunnugt hevur útgjaldið av fólkapensjón til tann einstaka pensjónistin so at siga verið sama krónutalið tey seinastu 10 árini. Meðan lønir, prísir og ikki minst BTÚ eru vaksin nógv hetta tíðarskeiðið, hava bert teir fólkapensjónistar, sum fáa viðbót til fólkapensjónina, fingið eina minimala regulering av útgjaldininum.

Í “Pensjónsnýskipan 2009” frá Fíggjarmálaráðnum finna vit onga útrokning ella framskriving av, hvussu stórur partur av BTÚ verður nýttur til fólkapensjón.

Vit hava tí biðið búskaparfrøðingar rokna hetta út fyri okkum: *Sí mynd*

**Danmark nýtir størri part av BTÚ til fólkapensjón enn Føroyar gera**

Danmark, sum eisini rindar ein part av okkara fólkapensjónsútreiðslum, nýtir sostatt munandi størri part av sínum BTÚ til fólkapensjón, enn vit gera, í 2005 heili 4,5% móti okkara 3,6%. Leysliga mett nýta Danir áleið 1% meira av teirra BTÚ til fólkapensjónir, enn Føroyingar gera.

Landsfelag Pensjónista skilir, at ikki bert almenningurin, men eisini mong tingfólk, ikki enn hava skilt og tikið støðu til tey ógvusligu árin, sum nýggja pensjónsuppskotið fer at hava á viðurskiftini hjá verandi og komandi fólkapensjónistum.

Fólkapensjónin er nú um hálva øld gomul, og vit eru samd við Fíggjarmálaráðið í, at stórur tørvur er á ábótum og nútímansgerð. Sumt í skipanini er grundað á avoldaðan hugsunarhátt.

**Politiska skipanin má ikki fremja ógvuslig inntriv í óðum verkum til skaða fyri pensjónistar**

Minkandi útreiðslurnar til fólkapensjón í mun til BTÚ siga okkum tó, at tað hevur ongan skund at fremja ógvuslig inntriv til skaða fyri pensjónistarnar. Stundir eru til, at bæði almenningur, áhugabólkar og politiska skipanin kunnu viðgera fólkapensjónsøkið, áðrenn stórur skaði í óðum verkum verður gjørdur bæði á fólkapensjónsskipanina og á vælferðina hjá tí einstaka pensjónistinum.

Heitt verður á Fíggjarmálaráðið um sum skjótast at koma við lógaruppskoti um fyrra part av pensjónsnýskapanini, uppsparing til eginpensjón.

**Pensjónsuppskotið má hava fólksliga viðgerð og ikki skrumblast ígjøgnum**

Tey ógvusligu og ógrundaðu inntriv, sum álitið um “Pensjónsnýskipan 2009” leggur upp til, mugu ikki skaða vælferðina hjá tí einstaka pensionistinum ella skaða grundleggjandi virðir í fólkapensiónsskipanini sjálvari, og mugu ikki verða skundað ella skrumblað ígjøgnum uttan fólksliga viðgerð og uttan eina gjølliga politiska viðgerð, ið førir til væl umhugsaðar niðurstøður.

Hetta skal tó ikki forða politisku skipanini í at gera bráneyðugar batar á pensjónina til gagns fyri ringast stillaðu pensjónistarnar.

Landsfelag Pensjónista heitir til innliga á Fíggjarmmálaráðið at sleppa ætlanini um at hava uppskot um inntriv í verandi fólkapensjónsskipan klárt longu 1. oktober og heldur seta eina meira realistiska tíðarfreist sum t.d. 1. oktober 2010.

**Útreiðslur til fólkapensjón í mun til BTÚ eru minkaðar í Føroyum**

Tað vísir seg, at útreiðslurnar til fólkapensjón hesi seinastu 12 árini hevur verið ein minkandi partur av BTÚ:

**Útreiðslur til Fólkapensjón í % av BTÚ 1997-2008:**

| 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4,2 | 3,5 | 3,6 | 3,6 | 3,3 | 3,5 | 3,7 | 3,6 | 3,6 | 3,3 | 3,2 | 3,2 |

Kelda: Fíggjarløgtingslóg 2000, 2002, og búskaparmeting Landsbankans 2002 og Hagtalstrunnur hjá Hagstovu Føroya.

Ein lækking úr 4,2% til 3,2% av BTÚ er í okkara eygum rættuliga álvarslig. Men eru fólkapensjónsútreiðslurnar høgar ella lágar í Føroyum samanborið við onnur lond? Heldur ikki hetta verður svarað í álitinuum, tí eingi samanberandi tøl verða har løgd fram.

**Útreiðslur til Fólkapensjón í % av BTÚ í Danmark 1996-2005**

Tað land, ið lættast er at samanbera við, er Danmark, og somu búskaparfrøðingar hava sett upp hetta yvirlit:

| 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4,9 | 4,6 | 4,6 | 4,4 | 4,3 | 4,3 | 4,2 | 4,4 | 4,3 | 4,5 |

Kelda: Forsikring og Pension og Danmarks Statistik Databank.

# Kann koma at kosta

BJØRN KALSØ
løgtingsmaður



Soleiðis sum reglurnar nú verða umsitnar ber ikki til at venda sær við serføroyskum matvørum til heimamarknaðin. Til stóran bága fyri ferðavinnu og annan smáídnað, eru smáar matstovur, handlar við serføroyskum viðskera og ferðavinnufyritøkur á bygd um ein háls av krøvum frá Heilsufrøðiligu. Myndugleikarnir mugu taka hendan spurning í álvara og fáa hann loystan.

**ES- marknaðurin**

Fyri at verða góðkendur fiskaútflytari er grundleggjandi neyðugt at halda seg til strongu ES-reglurnar á matvøruøkinum. Gera vit ikki tað, missa vit ein stóran part av okkara fiskakeyparamarknaði, og tað tola vit sjálvsagt ikki. Tann partin av ES-reglum, sum hevur við útflutning at gera, eiga vit tí framhaldandi at seta í gildi í Føroyum og at halda.

**Heimamarknaðurin**

Á heimamarknaðinum eiga vit at gera okkara egnu reglur, sum sjálvsagt skulu tryggja reinføri og dygd. Men hetta eigur at veðra gjørt uttan at gera krøvini so umfatandi, at tey ikki eru møgulig at halda hjá smáum føroyskum fyritøkum, sum royna at byggja ein marknað upp við serføroyskum mati og upplivingum. Gera vit ikki tað, fara hesar fyritøkur fyri bakka. Ikki tí tað er neyðugt, men heldur av okkara egnu forfeingiligheit.

Trupulleikin eigur at verða loystur, annaðhvørt við at áseta reglur í nýggju matvørulógina, sum ætlanin er at leggja fyri Løgtingið, ella eiga serlig atlit at verða tikin til okkara heimamarknað, tá ES-kunngerðir frameftir verða settar at galda fyri Føroyar. Fari í hesum sambandi enn einaferð at heita á landsstýrið um at taka hendan spurning í størsta álvara.

Alt gott um at landsstýrisfólk reika verðina runt á messum og ráðstevnum, fyri at greiða frá okkara serføroysku viðurskiftum. Men havast má eisini í huga, at tað er her heima at arbeiðið skal gerast.

**Núverandi støða ikki haldbar**

Reglurnar verða sum er umsitnar soleiðis, at tað ber ikki til at framleiða serføroyskan mat til heimamarknaðin. Framleiðararnir verða snøgt sagt um ein háls av órímiligum krøvum frá Heilsufrøðiligu. Støðan er ikki haldbar og má tí fáast á beint, skulu vit hava nakra vón um framhaldandi at varðveita smáu matstovurnar, handlar við serføroyskum mati og smáu ferðavinnufyritøkur á bygd.

At fara undir at nýta tíggjutals milliónir til marknaðarførðslu av Føroyum sum ferðavinnuland er burturvið, um omanfyrinevndu viðurskifti ikki fáast í rætt lag sum skjótast.



Sosialurin
Nr. 144 • Mánadagur • 3. august 2009 • 83. árg. • Kr. 20,00
Bíða eftir hjálp móti CTD:
Deyðilig sjúka hóttir føroyingar
Síða 6-9
Bót fyri at skjóta svartfugl
Síða 12
Vandamikil parkering í Saltangará
Síða 30
EB/Streymur-KÍ 7-0:
Størsta tapið hjá KÍ nakrantíð
Eykablað 12 síður
ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Størsta tapið nakrantíð
Kirkjubøgarður:
Um stutta tíð steingir Kirkjubøgarður fyri almenninginum. Orsøkin er, at køkurin hjá hjúnunum ikki longur verður góðkendur av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Nú tíma Patursson hjúnini ikki longur at stríðast. - Tí verður lykilin snaraður, áðrenn mánaðurin er liðugur, sigur Jóannes Patursson
Síða 11
STEINGIR FYRI FERÐAFÓLKI

*Forsíðan á Sosialinum 3. august, har Jóannes Patursson, bóndi í Kirkjubø, boðar frá, at tey steingja Kirkjubøgarð fyri ferðafólki vegna strongu krøvini frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni*

# Lívfrøðiliga burðardygg veiða

JÓGVAN SUNDSTEIN



Herfyri hevði eg stuttan fyrispurning til navngivnar tingmenn um, hvussu lívfrøðilig burðardygg veiða skuldi skiljast. Hetta serliga tí summir av teimum høvdu tann pástand, at føroyska fiskiveiðan ikki var burðardygg, men tvørturímóti mátti lýsast sum ovurveiða.

Tíðin gekk og eingin svaraði, men nú endiliga kom svar frá Eyðgun Samuelsen, og tøkk skal hon hava fyri tað.

**Svar hennara er í høvuðsheitum:**

Veiðan er lívfrøðiliga burðardygg, um støddin á gýtingarstovninum er avgerandi fyri, hvussu nógv verður fiskað, og um ein annars fylgir ICES reglum, eisini vióvíkjandi verjutiltøkum v.m.

Síðani verður víst til Skipannarnevndina, sum aftur vísir til gýtingarstovnin, og at veiðutrýstið skal halda seg til um leið triðingin av stovninum, um hesin er omanfyri eina minstustødd.

Víst verður eisini til lógina um vinnuligan fiskiskap, sum sera skilagott sigur: “Dentur verður lagdur á, í umsitingini av hesi lóg, at varveita tilfeingið og at troyta og gagnnýta hetta burðardygt á skilabesta hátt, lívfrøðiliga og búskaparliga”.

At enda verður víst til, at vit ikki fáa nøktandi prís fyri okkara fiskavøru, um hon ikki er fingin til høldar á burðardyggan hátt.

Svarið vísir sostatt í øllum førum á tað meiri yvirorðnaða og formella í reglunum og politisku ásetingunum. Hinvegin verður ikki nomið so nógv við tær praktisku loysninirnar, og hvussu fram skal farast í samsvar við, at tíðir broytast og fiskiskapurin er skiftandi og umstøðurnar hjá stovninum, bæði gýtingarstovninum og vaksna stovninum. Veruleikin er jú tann, at fiskastovnurin verður ávirkaður av nógvum ymiskum fyribrigdum. Veiðuorkan, ikki minst reiðskapurin og skipasløg ávirka stovnin, men tað sum veruliga hevur uppaftur størri týdning eru náttúrufyribrigdini. Vøksturin í havinum, æti og ikki minst hitalagið hevur alstóran týdning. Bæði um okkara leiðir og aðrastaðni vita vit um fiskaloysi og fiskaflyting, serliga av hitalags umstøðum. Náttúruna fáa vit ikki gjørt so nógv við, sjálvt um politikkarar halda seg kunna ávirka veðurlagið, men sjálvan fiskiskapin kunnu vit ávirka. Hetta er eitt samspæl millum varveitslu av einum tilfeingi, samstundis sum tað skal gagnnýtast. Einki er tí at ivast í, at t.d. gýtingarøki skulu friðast, at ungfiskur skal verjast o.s.fr., men samstundis skal eisini stóri fiskurin fiskast.

Um eg havi skilt tað rætt royna føroysku myndugleikarnir at troyta og gagnnýta fiskatilfeingið so skilagott sum møguligt, og sjálvt um ósemja er um ásettu og samtyktu tiløkini, er breið semja um, at sum mest má fáast burtur úr bæði í nútíðini og framtíðini. Tað vil siga at alt skal vera burðardygt. Tí hoyrir tað ongastaðni heima, tá onkrir politikkarar sleingja út, at førdi fiskivinnupolitikkurin bert fremur grova ovurveiðu.

Eisini kann vísast á, at ávísur føroyskur skipabólkur hevur til skjals veiðuhagtøl fyri eitt lutfallsliga langt áramál, sum prógvar, at framdi fiskiskapurin hevur verið burðardyggur, sjálvt um fiskiárini hava verið ymisk.

Lat meg leggja afturat, at eg júst í gjár (21.08.2009) las í norska Dagens Næringvej, at “Barentshavet koker over”. Hetta er serliga um toskin sum økist í stórum frá Lofoten og norðureftir, hann økist bæði í mongd og í vekt, tí liviumstøðurnar vegna hækkandi sjóarhita batna so nógv. Norðmenn byrja at tosa um at minka toskakvoturnar, tí ov nógvur fiskur fer at koma á marknaðin.

Annars haldi eg, at føroyingar við síni fiskivinnulóggávu skulu úti í heimi vísa á, hvussu umhvørvisvinarligt fiskiskapurin fer fram, og harvið tryggja sær umhvørvisgóðkenning frá seriøsum felagsskapum.